# at fiskurin veksur

Tað serstaka við teimum smærru ringunum er, at fiskurin ikki er viðgjørdur ímóti ILA-sjúkuni.

Eygu verða kortini hildin við honum, á sama hátt sum við teimum hundraðtúsundtals fiskunum í hinum ringunum.

Í dag man tann størsti fiskurin verða vaksin til meiri enn 2 kilo. Gongst sum ætlað verður hann slaktaður í summar.

Tá skuldi hann helst vigað tað dupulta.

## Ein runda

> *Vit sigla fyrst eina rundu kring allar ringarnar fyri at tjekka, um nakað er áfatt ella er hent, meðan vit hava verið burtur*

Arbeiðsdagurin hjá Mikkjali og báðum starvsfelagum hansara byrjar, sum hjá so mongum øðrum í landi, klokkan átta um morgunin.

Tá fara teir við reyðmálaða alibátinum tann stutta teinin út til ringarnar, fyri at vissa seg um, at alt er sum tað skal vera frá morgunstundini av. Fyri teir er ikki spurningur um, hvussu veðrið skikkar sær.

- Ja, vit mugu bara avstað, og so er líkamikið hvussu veðrið skikkar sær.

- Vit sigla fyrst eina rundu kring allar ringarnar fyri at tjekka, um nakað er áfatt ella er hent, meðan vit hava verið burtur, greiðir Mikkjal frá.

Tá hetta eftirlitið er liðugt, verður lagt at við tann stóra og serbygda aliflakan, sum síðani er teirra arbeiðsstað restina av degnum.

## Ikki liggja deyður

Í gjáramorgunin var somuleiðis lagt frá landi til ásetta tíð, men fyrraparturin gjørdist eitt sindur ódrúgvur. Teir fingu fyrst vitjan av fólki frá skipasmiðjuni, sum skuldu gera okkurt arbeiði umborð.

Eftir døgurða fingu teir heldur ikki frið at útinna arbeiðið teirra, tí tá komu umboð fyri tíðindatænastuna umborð!

- Í morgun løgdu vit merki til, at ein luftslanga til "liftup-arin" var lopin av. Hetta arbeiðið máttu vit fáa bøtt um rættiliga skjótt, tí annars kundu vit ikki taka tann deyða fiskin upp úr ringunum.

- Vit plaga at taka tann deyða fiskin upp hvønn dag – onkutíð tó annanhvønn dag. Tað skal helst ikki ganga meiri enn tveir dagar ímillum, tí hann skal ikki liggja deyður ov leingi í ringinum, greiðir Mikkjal frá.

Ger fiskurin tað, kann tað vera eitt gott agn og høvi hjá kópi at nærkast aliringinum.

## Tjekkað alt

Umborð á flakanum finst tann stóra fóðurgoymslan, umframt ein hóp av útgerð og tólum í sambandi við alingina.

Millum tey mongu tólini er eitt myndatól í hvørjum einstøkum ringi, soleiðis at teir til eina og hvørja tíð kunnu fylgja við, hvussu fiskurin hevur tað í ringinum.

Tá teir hava tjekkað alt, kunnu teir til dømis fara út á ringarnar at gera tað aftur, sum kanska er farið um náttina. Her kann verða talan um umvæling av ymiskum, millum annað av fortoyningunum ella eftirlit av netinum, sum skal halda likkurnar burtur frá ringinum.

Tá teir komu út á alibrúkið seinnapartin í gjár, sóu teir at ein fuglur var fangaður í netinum. Henda máttu teir eisini taka burtur.

Eitt annað týdningarmikið arbeiði um morgunin er at fáa greiðu á, um fiskurin er svangur.

Teir tveita tá eitt sindur av fóðuri út, og síggja so um fiskurin tekur tað. Ger hann tað, er tað eitt tekin um, at honum tørvar fóður, og so mugu teir geva eyka fóður. Hetta sama gera teir um kvøldarnar, áðrenn teir fara til hús aftur.

## Rætta fóðurið

Stóri alibáturin er sum nevnt væl útgjørdur við øllum hugsandi tólum til eitt vælrikið alibrúk.

Rúmligar umstøður eru til manningina at vera í, og góðar umstøður eru somuleiðis hjá teimum at útinna teirra dagliga arbeiði.

Umborð finnast eisini seks stórar silo'ir til alifóðurið, sum hevur ymiska stødd – alt eftir, hvørja vekt, ið teir meta at fiskurin hevur.

Í ringunum gongur fiskur í ymiskum støddum. Teir størstu munnu í dag viga eini 2-300 gramm yvir 2 kilo, meðan aðrar minni støddir eru í øðrum ringum.

- Hevur fiskurin ta ávísu støddina, so fær hann tað ávísa støddina av fóðuri. Alt hetta kunnu vit blanda umborð, sigur Mikkjal.



Tann stóri alibáturin í baksýni er teirra arbeiðspláss um dagin. Her eru góðar arbeiðsumstøður og øll neyðug tól til arbeiðið



Er neyðugt at fóðra eyka, so verður tað eisini gjørt. – Hetta gera vit morgun og kvøld, sigur Mikkjal Samuelsen

> *Ein kann jú ikki bara skjóta í fleng og royna at raka. Skulu vit skjóta kópin, so mugu vit verða vísir í, at hann doyr*



Jan Eskild Glyvradal úr Haldórsvík er stýrimaður, tá umboð fyri tíðindatænastuna vitjaðu alibrúkið seinnapartin í gjár

## FAKTA

**Vestsalmon**

er ein tann størsti framleiðarin og útflytarin av aldum laksi og sílum úr Føroyum. Fiskurin verður aldur á teirra egnu alibrúkum, sum liggja í føroysku firðunum. Hann verður síðani kruvdur og pakkaður á virkinum í Kollafirði.

Teir eiga og stýra øll framleiðsluliðini, tað er: alibrúk, smoltstøðir og hagreiðingarvirki. Soleiðis hava teir fult tamarhald á, at góðskan livir upp til krøvini hjá kundum okkara kring allan heim. Vørurnar verða seldar til keyparar kring allan heimin.